## DAGSINS MEINING

# Óvanlig støða

Parlamentariska støðan eftir løgtingsvalið er ein tann løgnasta í politisku søgu okkara. Tað stendur javnt millum samgongu og andstøðu. Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hava skipað seg í bólk. Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin hava somuleiðis skipað seg í bólk. Hesar blokkskipanir hava tað við sær, um tær halda, at tað er ómøguligt at skipa eina samgongu, sum hevur meiriluta. Andstøðan kallar mannagongdina, sum løgmaður brúka fyri ódemokratiska og heldur, at hann eigur at leggja kongin og lata tingformannin bóltin, sum so aftur gevur hann víðari til størsta flokkin. Hvat hann tó neyvan ger.

Hvat enn man heldur vera ódemokratiskt og ómoralskt eftir eitt val, so er tað greitt, at hvør er sær sjálvum næst og tað ikki minst í politikki. Løgmaður hevur helst hildið, at hann hevur tikið eitt genialt stig, tá hann bant Sjálvstýrisflokkin til sín. Harvið hevur hann tryggjað Fólkaflokkinum luttøku í nærum øllum samgongumøguleikum. Men kanska var hetta eisini eitt sjálvmál, nú tá andstøðan brúkar somu resept sum løgmaður. Hvat vit enn halda vera góðan sið og mannagongd og gott demokrati, so má sigast, at løgmaður er í vandaskógvi tá tað um moral ræður. Tað hann ger er meira í atliti til Fólkaflokk enn til fólkastýri. Og sum løgmaður átti hann at sett fólkastýrið fram um Fólkaflokkin.

Nú vita vit ikki, hvat kemur burtur úr hesi løgnu vend í samráðingunum. Spurningurin er, hvussu leingi andstøðan megnar at standa saman. Um løgmaður nú hevur avskrivað C, kann hugsast, at hann gevur H eitt so mikið gott tilboð, at Jenis hevur ilt við at siga nei takk, hóast gjørdu avtaluna við B og C. Vit loyva okkum at ivast í, hvussu leingi Jenis megnar at halda saman við B og C. Í politikki eru avtalur ein grásona. Tí kann avtalan við Jenis gerast ein boomerangur fyri C, sum tó hevur valt at spæla út við opnum og ærligum kortum.

Formaður Javnaðarfloksins hevur rætt tá hann sigur, at flokkurin eftir valið ikki bara kann fara út í Nesið og reparera eina samgongu, sum hevur mist meirilutan. Skal hann við, má byrjast heilt av nýggjum. Spurningurin er, um løgmaður uppfatar tilboðið til C sum eina roynd at reparera uppá eina samgongu ella hann umboðar ein blokk millum sín egna flokk og D og hevur biðið ikki bert C men eisini E koma til samráðingar. Spurningurin er eisini, um løgmaður eisini stendur aftanfyri orðini hjá varaløgmanni um at samgongan fer til samráðingar við C við løgtingssamtyktini um sjálvstýri Føroya Fólks sum grundarlag. Eftir tí sum løgmaður hevur meldað út kundi okkurt bent á, at hetta ikki neyðturviliga er hansara støða eisini. Hann hevur tvørturímóti víst á, at flokkarnir og her ikki minst E verður noyddur til at nærkast miðjuni meira ella linka um ferðina á fullveldistilgongdini. Løgmaður veit, at skal hann fáa C við, so verður tað ikki við einum E, sum setir dagskránna. Vil løgmaður ikki leggja kongin nú so eigur hann at melda greitt út, at A og D sum blokkur og ikki sum partur av samgongu vil hava samráðingar við bæði E og C. Ber ikki til at fáa hesar flokkar at semjast eigur hann at royna ABC.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvat vísti løgtingsvalið?

**Petur Páll Mikkelsen**
*Við javnaðarkvøðu*



Áhugavert hevur verið at sæð, hvussu ymiskt floksformenninir hava tulkað úrslitið av løgtingsvalinum. Veljarin hevur koldømt fullveldisætlanina sigur onkur, meðan onnur siga, at ein meiriluti ikki er ímóti ætlanini. Tó er skjótt at staðfesta, at Sambandsflokkurin gjørdist stóri vinnarin av valinum, men hvør gjørdist so stóri taparin av valinum? Sjálvur haldi eg, at tað er lætt at staðfesta, at Javnaðarflokkurin hevði ringasta valið av teimum fýra stóru flokkunum. Vónandi fær hetta leiðsluna í flokkinum at taka í egnan barm og endurskoða linjuna, ið hevur verið førd síðstu fýra árini.

Eftir vánaliga valið í 1994 royndi flokkurin at gera seg meira óheftan av danska javnaðarflokkinum og fór at arbeiða meira miðvíst fyri, at Føroyar skuldu gerast eitt sjálvstøðugt land. Hetta løntu veljararnir flokkinum fyri og góvu honum dygga undirtøku til valið í 1998. Tíverri eydnaðist flokkinum ikki tá at koma í samgongu, men so fekk hann harafturímóti fýra ár í andstøðu at styrkja seg.

Hvønn andstøðupolitikk valdi flokkurin so at føra? Gloymd var uppgerðin við danska javnaðarflokkin og førdur var ein politikkur, har flokkurin gjørdist garantur fyri framhaldandi støðu innan fyri ríkisfelagsskapin. Hann var so avgjørdur, at sagt var, at »Javnaðarflokkurin gongur ongantíð við til eina loysn, ið liggur uttan fyri ríkisfelagsskapin.« – Sjálvur meti eg hetta sum eitt sera grovt svik móti sjálvstýrisvonginum í flokkinum. Tíbetur vísti valið okkum, at Javnaðarflokkurin ikki vinnur við at føra reinan sambandspolitikk. Sambandsveljarar velja sambandsflokkin kortini.

Nú er møguleiki hjá flokkinum at koma í samgongu, og mín vón er, at flokkurin hálsar um. Tað skuldi ikki verið ómøguligt at farið í samgongu við Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin at framt yvirtøkur, tí sjálvstýrislógin leggur upp til hetta sama. Um leiðslan í flokkinum hevur so ilt av fullveldistøkuni, so verður hon ikki aktuel hetta landsstýrisskeiðið, og tá ið hon kemur, er tað ikki ein flokspolitiskur spurningur. Hon kann bert fremjast við eini fólkaatkvøðu.

# Tulking av valúrslitinum

**Atli Hansen**



Áðrenn valið vóru ymiskar hugsanir frammi um, hvat ið kundi leggjast í eitt valúrslit. Høgni Hoydal vildi gera valið til eina fólkaatkvøðu um fullveldistilgongdina og mátið mátti so vera undirtøkan til ávikavist samgonguna og andstøðuna.

Og nú kenna vit úrslitið. 48,9 % av atkvøðunum fyri samgonguni og 51,1% fyri andstøðuni ella ímóti fullveldistilgongdini. Also ein greið avgerð.

Men nei, sigur Høgni Hoydal. Man telur ikki atkvøður, men tinglimir og her hevur samgongan ikki fingið meiriluta ímóti sær. Men er tað nú púra rætt?

Andstøðan hevur sínar 16 limir. Tað skerst ikki burtur. Men um vit fara inn í onkran av samgonguflokkunum og analysera úrslitið, so kunnu vit kanska vaksa um stuðulin til sjónarmiðini hjá samgonguni.

Taka vit t.d. Fólkaflokkin í Suðurstreymi. Har hava sitið 2 umboð í síðsta valskeiði, sum bæðið hava gingið fyri at vera lítð fyri fullveldiskósini og heldur høvdu sæð eina samríkjaloysn.

Hesir báðir fingutil valið kapping frá tveimum tungvektarum, har annar bað fólk stuðla fullveldistilgongdina og hin hevði eina meira moderata formulering um »sjálvstýri føroya fólks«. Báðir eru hildnir at vera á loysingarveinginum í Fólkaflokkinum.

Og hvussu gekk so valið millum hesar? Jú, Suðurstreymoyingar valdu Óla Breckmann og Bjarna Djurholm aftur við tilsamans 892 atkvøðum, meðni Poul Michelsen og Bjarti Mohr tilsamns bert fingu 548 atkvøður. Samríkjavongurin í Fólkaflokkinum í Suðurstreymi vann á fullveldisvonginum. Og hetta úrslitið kunnu vit væl loyva okkum – í hvussu so er lutvíst – at leggja afturat hjá andstøðuni og draga frá hjá samgonguni.

Úrslitið hjá Fólkaflokkinum í Suðurstreymi vísir tað sama sum tær flestu veljarakanningar gjøgnum valskeiðið hava víst nevniliga, at ein stórur partur – úti við helvtina – av Fólkaflokkinum ikki tekur undir við valdu fullveldikósini.

Ein varin niðurstøða av hesum má vera, at 60 - 65 % av føroyingum søgdu nei til fullveldistilgongdina, um úrslitið skuldi lesast sum ein fólkaatkvøða. Ein sera greið niðurstøða. Og kortini hava løgmaður og varaløgmaður hug at halda áfram sum um einki val hevur verið.

Parlamentarisman og parlamentariskar siðvenjur tykjast at hava ómetaliga torført við at vinna fótafesti í Føroyum. Hetta kemur av, at politikarnir ikki vilja vera við til at byggja siðvenjurnar m.a. við at lurta eftir veljarunum og taka nakrar avleiðingar. Hetta er eisini galdandi í politiska gerandislívinum millum valini og er á ongan hátt við til at byggja upp álit á politiska bygnaðin og tær politisku skipanirnar. Tað er langt eftir hjá okkum at røkka sama politiska støði sum t.d. í hinum norðanlondunum.

Løgmaður eigur at hyggja eftir tendensinum í valinum og gera sínar metingar út frá hesum. Og tá átti tað ikki at verið so torført antin sjálvur at vent sær aðrar vegir fyri at biðja um stuðul ella at taka seg til síðis, soleiðis at onnur sleppa framat.

Meira enn 90 % av føroysku veljarunum góðu løgmanni greið beske um teirra hugsan.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Altjóðadagur hjá sjúkrasystrum

Í samband við altjóðadagin hjá sjúkrasystrum í hesum mánaðinum verður bjóðað til fyrilestur fyri sjúkrasystrar í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum leygardagin 11. mai 2002 kl. 10.00 til kl. 14.00. Luttakararnir fáa døgurða frá kl. 12.00 til kl. 13.00.

Fyrilestrarhaldari verður norska sjúkrasystirin og doktari í Public Health Anne G. Vinsnes, sum kemur at greiða frá síni doktararitgerð um avleiðingar av urininkontinens – eitt studie um lívskvalitet hjá kvinnum og hugburði hjá røktarstarvsfólkum.

Harumframt verður greitt frá eini verkætlan í granskíng og kompetansumenning á sjúkrarøktarøkinum.

Fyrilesturin er ókeypis fyri sjúkrasystrarnar. Teir ymisku stovnarnir innan almanna – og heilsuverkið – tey trý sjúkrahúsini, Heimarøktin/Serforsorgin, Sjúkrasystrafelag Føroya og Sjúkrasystraskúlin eru felags um at gjalda fyri tiltakið.

# Myndaframsýning í Runavík

TÍÐINDASKRIV

Myndaframsýningin hjá Klaus Kiesewetter, Úr Kap Hoorn til Antarktis, verður nú sýnd fram í býráðshøllini í Runavík. Tær 43 fotomyndirnar lýsa m.a. teir fyrstu pólfarararnar, ta norsku hvalafangaratíðina, plantu- og djóralívið, truplu ísviðurskiftini, altjóða granskingarstøðirnar, gosvirksemi og fiskiskap. Høvi verður at vitja myndasýningina í býráðshøllini í Runavík frá mánadegnum 29. apríl til fríggjadagin 31. mai. Opið er sunnu- dagar frá kl. 16 til 18 og gerandisdagar frá kl. 13 til 15.

Eitt sindur um Antarktis Heimsparturin Antarktis var tann seinasti heimsparturin, sum bleiv funnin. Antarktis er á stødd við Europa.

98% av fastlandinum er fjalt av einum íslagi, sum kann verða upp móti 4 km tjúkt. Hetta svarar til 90% av øllum ísi á jørðini.

Um ísurin í Antarktis smeltaði, hevði sjógvurin í heimshøvunum hækkað við 60 metrum.

Úti við strondina kálvar ísurin risastórar ísflakar, á stødd við oynna Fyn, í havið. Kuldin kann til tíðir koma niður á 89 kuldastig og vindferðin á teimum katabatisku vindunum er viðhvørt omanfyri 80 m/s.

# Danish Brewery Group skift umboð

**Føroyska umboði hjá The Danish Brewery Group A/S skiftir frá 3. juni 2002 umboð í Føroyum**

HEILSØLA
*Ingrid Bjarnastein*

Í samband við tær broytingar, sum eru farnar fram í Eysturoyar Heilsølu, hevur The Danish Brewery Group A/S í samráð við Eysturoyar Heilsølu gjørt av, at samarbeiðið skal halda uppat 31. maj 2002. Danish Brewery Group selur millum annað tær vælkendu Faxe Kondi sodavatnirnar.

– Eysturoyar Heilsøla hevur í samfull 30 ár røkt okkara sølu við góðum úrsliti, og hetta eru vit takksamir fyri, sigur Danish Brewery Group í tíðindaskrivi.

Frá 3. juni 2002 yvirtekur Poul Michelsen søluna av Faxe-drekkivørum í Føroyum. Samstundis verður sagt, at starvsfólkini á Eysturoyar Heilsøllu, sum hava havt við Danish Brewery Group at gera, øll flyta yvir til P/F Poul Michelsen og koma har at taka sær av sølu- og marknaðarrøkt av vørum hjá Danish Brewery Group.




*Eysturoyar Heilsøla selur frá 31. maj ikki longur Faxe Kondi, men fer Poul Michelsen nú at reka hesa søluna*
*Modelmynd: Álvur Haraldsen*

# Fotoframsýning í Snarskivuni í miðbýnum

**Fólk, sum hava eitthvørt ørindi í Snarskivuni og á posthúsinum í miðbýnum í Havn í mai mánaði, kunnu samstundis nýta høvi at steðga á eina løtu í hugnaligu forhøllini, har ein forvitnisliga fotoframsýning lat upp á krossmessu.**

Snarskivan, ið er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu, húsast saman við postavgreiðsluni í gamla posthúsbygninginum í miðbýnum. Hugnaliga forhøllin, nevnd Torgið, verður eisini brúkt til framsýningar. Síðani Snarskivan lat upp, hava skiftandi framsýningar verið á Torginum, har føroysk listafólk hava sýnt fram.

Á framsýningingini, sum Finnur Johansen hevur lagt til rættis saman mentamáladeildini, eru 15 svart/hvítar fotomyndir. Myndevnini eru fyrrverandi kommunulæknarnir: Højgaard og Poulsen og yvirlæknarnir Dahl og Magnussen. 5 myndir vísa Sanatoriið í Hoydølum fyri 1930 og aðrar 5 myndir vísa Landssjúkrahúsið og umhvørvið í Sandagerði í 1930'unum.

Á hvørjum ári síðani 1984 hevur Finnur Johansen, fyri Tórshavnar býráð, skipað fyri mongum framsýningum við gomlum myndum úr Havnini.

Ætlanin er, at myndirnar skulu prýða veggirnar í nýggju læknamiðstøðini í Gundadali, har fýra kommunulæknar hava viðtalu.

Framsýningin verður opin í mai mánaði.

Høvi er at síggja framsýningina, tá ið opið er í Snarskivuni, mánadag - fríggjadag kl. 9 - 16, tó hósdag kl. 9 - 18.



*Finnur Johansen hevur lagt til rættis framsýningina í Snarskivuni*